# Jólakalendarin 2005

# Jólini í Hvannadali

**Partur 8**



Tá teir eru komnir inn í skúrin aftur, hyggja teir beinanvegin, um jólamaðurin er vaknaður – tað er hann tíbetur ikki.

- Hatta gekk óføra væl Anthonio, tú dugir ordiliga væl at spæla jólamaður.

- Heldur tú tað? spyr Anthonio, meðan hann roynir at fáa ullina av andlitinum aftur.

- Men tú dugir eisini væl.

- Jú jú, takk fyri tað. Stampi, heldur tú, at jólamaðurin fer at vakna í kvøld?

- Nei Anthonio, stoyturin hann fekk var so mikið harður, at hann vaknar ikki fyrr enn í morgin, og tá eru vit langt av landi skotnir. Nú mugu vit hvíla okkum eina løtu - vit mugu verða væl fyri, tí í nátt fara vit at stjala gávurnar undan hvørjum tí einasta jólatræ í bygdini. Ha ha ha ha ha ha ha.

Erling og Jógvan eru longu farnir í holt við at taka pallin niður. Teir tosa ikki saman. Jógvan er enn óður inn á Erling, tí Erling misti hamarin á høvdið á honum, og Erling torir ikki at siga nakað við Jógvan, tí hann veit, at tað allar minsta kann øsa hann upp. Men arbeiðið gongur skjót, og áðrenn teir vita av, so er allar pallurin niðurtikin. Eftir stendur tað vakra og stóra jólatræið og lýsir alt torgið í bygdini upp.

Trølla Pætur og Trølla Omman eru á veg til hús. Sjálvt um hýrurin er góður á Trølla Pætur, so er hann eitt sindur vónbrotin av jólamonnunum.

- Eg haldi ikki, at teir sóu fittir út, sigur Trølla Pætur.

- Ikki hugsa um tað góði, gleð teg bara til í morgin, tí í morgin er jólaaftan, sigur omman troystandi.

- Ja, nú skal eg bara sova eina nátt afturat.

- Ja góði, í morgin sleppur tú at pakka allar pakkarnir upp, sum tú hevur fingið.

- Eg eri so spentur at síggja, hvat eg havi fingið frá tær og Ossa, sigur Trølla Pætur, meðan hann fer hoppandi niðan gjøgnum bøin.

Tey eru nú komin til húsini og fara inn.

- Nú skalt tú fáa ein heitan temunn og ein vælsmakkandi bolla frá ommu. Tá tú hevur etið, so skalt tú fara og leggja teg. Í nátt fara jólamenninir at leggja enn eina gávu undir træið. Tað verður spennandi hjá tær at vakna í morgin.

Tá Trølla Pætur hevur etið bollan og drukkið drekkamunnin, mussar hann ommu sína góða nátt og leggur seg í songina. Hann er bæði móður av degnum og spentur til dagin í morgin, og áðrenn hann veit av, so liggur hann í fasta svøvni. Omman situr eina løtu fyri seg sjálva, men eisini hon er troytt. Hon minnist aftur, tá hon var smágenta, og hvussu nógv hon gleddi seg til jóla. Tað var ein góð og stuttlig tíð. Hon reisir seg, sløkkir eftir sær, og tá ein lítil løta er farin, liggur eisini hon og svevur.

*Puntur 12 til jólakalendaran*




